

*Tey bestu innan føroyska fótboltsheimin hetta kappingarárið. Frá vinstru eru tað Malena Josephsen, Súsanna Hansen (tók móti steypinum hjá Jacob Thomsen), Randi Wardum, Rannvá B. Andresen, Petur Reinert, Ingi Højsted, Jákup Mikkelsen, Sorin Anghel, Olga Kristina Hansen og Christian Høgni Jacobsen. Pól Thorsteinsson, sum tók móti steypinum hjá Sigfríður Clementsen vantar á myndini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Veldugt gallakvøld

**Bygdarhúsið í Leirvík var leygarkvøldið karmur um eitt fótbóltsgalla, sum heilt víst verður roknað sum eitt tað mest væl eydnaða av slagnum**

GALLAKVØLD
*Jákup Mørk*

Eftir at Gallakvøldið seinnu árini hevur hildið til í Fuglafirði, høvdu fyrireikararnir úr GÍ hesa ferð gjørt av, at flyta tiltakið til bygdarhúsið í Leirvík. Hetta soleiðis at kvøldið - alt sum tað var - kundi ognast fótbóltinum, heldur enn at talan hevur verið um almennan dans, soleiðis sum tað so ofta áður hevur verið galdandi.

Og sum skilst, so eydnaðist hetta eisini á besta hátt. Nógv fólk var møtt upp til veitsluna, og lagið undir borðhaldinum var somikið gott, at fyrireikarnir púrasta droppaðu ætlaða undirhaldið, sum annars var á skránni. Snøgt sagt, so bóru tey ótta fyri, at hetta fór at køva stemningin nakað, so gott var lagið.

### Fagnaður við B36-borðið

Hæddarpunktið á veitsluni var sjálvandi, tá tað eftir borðhaldið varð avúkað, hvørjir spælarar fingu ymsu virðislønirnar. Fagnaðurin var stórur kring flestu borðini, men fáa staðni somikið stórur, sum hann var við B36-borðið. Meistararnir í Formuladeildini gjørdu mest sum slætt borð, og ikki færri enn fimm ferðir vóru boð eftir fólki úr árstalsfelagnum.

Hjá monnunum gjørdist Jákup Mikkelsen stóri sigursharrin, tá hann bæði gjørdist ársins spælari og ársins málverji. Ingi Højsted, sum fyri fyrstu ferð spældi í bestu føroysku deildini í ár, gjørdist ársins stjørnuskot, og fyri at setta prikkin yvir i'num gjørdist Sigfríður Skaale Clementsen ársins venjari. Og eisini á kvinnusíðuni gjørdist talan um steyp, tá Jacob Thomsen fekk heiðurin sum ársins venjari.

KÍ-kvinnurnar plaga vanliga eisini at taka fyri seg, og tað gjørdu tær eisini leygarkvøldið. Rannvá Andreasen hevur í fleiri ár verið roknað millum bestu kvinnuligu spælararnar her á landi, og tað var eisini hon, sum hevði fingið flestu atkvøðurnar, tá talt varð saman. Og á málverjasíðuni áttu klaksvíkskvinnurnar eisini besta kortið. Har tað hjá monnunum var ein klaksvíkingur í Havn, sum fekk heiðurin, var tað hinvegin ein havnarkvinna í Klaksvík, sum fekk steypið hjá kvinnunum, tá Randi Wardum ikki óvæntað varð rópt upp.

Sum stjørnuskot á kvinnusíðuni fall valið á Olgu Kristinu Hansen úr AB. Hon hevur í ár gjørt sera nógv um seg í AB-álopinum. Og tað var ein sjónliga fegin spælari, sum tók ímóti heiðrinum, sum hon vann í kapping við Jacobu Langgaard og Heidi Sevdal úr GÍ.

### Gyltu skógvarnir

Og so var hetta sjálvandi eisini kvøldið, har gylti skógvurin frá Thomas Dam Ítrótti skuldi latast. Hesa ferð vóru tað Malena Josephsen og Christian Høgni Jacobsen, sum áttu flestu málini í fremstu deildunum.

Hjá Christian Høgna hendi hetta í harðari kapping við Sorin Anghel. Men tá hesin hevði leikbann seinasta umfarið, fekk Christian Høgni spurta seg einsamallan á odda. Heilt sørur gjørdist Sorin tó ikki. Fjeppararnir hjá Dimmu høvdu nevnliga gjrøt av, at hann skuldi hava ein serstakan heiður, og fyri hetta fekk hann heiðursbræv.



*Um hálvtannað hundrað fótbóltsfólk úr øllum landinum vóru komin til Leirvíkar, har tað nógva av tíðini mundi fara til at hugleiða um júst lidna kappingarárið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Tey bestu

**Niðanfyri sæst, hvørji fingu handað hvat á gallakvøldinum í Leirvík. Gevið gætur, at tað ikki framgongur, hvør raðfylgjan var á teimum báðum, sum vóru næst vinnarunum í atkvøðugreiðslunum**

**Gylti skógvurin, kvinnur**
Malena Josephsen, KÍ 27 mál
Halltóra Joensen, B36 22 mál
Rannvá Andreasen, KÍ 21 mál

**Gylti skógvurin, menn**
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ 18 mál
Sorin Anghel, EB/Streymur 16 mál
Jónhard Frederiksberg, Skála 13 mál

**Málverjar, Kvinnur**
RANDI WARDUM, KÍ
Mildrid Djurhuus, EB/Streymur
Laila Jespersen, B36

**Málverjar, menn**
JÁKUP MIKKELSEM
Predrag Mirkovic, TB

**Venjari, kvinnur**
JACOB THOMSEN, B36
Jón Harald Poulsen, KÍ
Petur Thomsen, GÍ

**Venjari, menn**
SIGFRÍÐUR SKAALE CLEMENTSEN, B36
Piotr Krakowski, EB/Streymur
Jóhan Nielsen, Skála

**Stjørnuskot, kvinnur**
OLGA KRISTINA HANSEN, AB
Jacoba Langgaard, GÍ
Heidi Sevdal, GÍ

**Stjørnuskot, menn**
INGI HØJSTED, B36
Páll M. Joensen, NSÍ
Bergur Midjord, B36

**Dómari**
PETUR REINERT
Lassin Isaksen
Eiler Rasmussen

**Ársins spælari, kvinnur**
RANNVÁ ANDREASEN, KÍ
Unn Jónsdóttir Kragesteen, B36
Halltóra Joensen, B36

**Ársins spælari, menn**
JÁKUP MIKKELSEN, B36
Sorin Anghel, EB/Streymur
Óli Johannesen, TB